> *»Nú fari eg at steikja hjernan á pannuni hjá tær. Eg havi einki etið, síðani daman rýmdi frá mær«*
> *- Úr sanginum Grannin*

> *»Vit búgva á Herberginum. Vit hava eina heila madrass í part. Vit gingu einaferð í skúla, men har hava vit einki lært.«*
> *- Úr sanginum Herbergið*

> *»Børnini komu grátandi, tá hann spældi 1-2-3 sting inn í. Børnini komu ýlandi, tá hann spældi 4-5 longur inn«*
> *- Úr sanginum Pedofilurin*

# Enn fúlari




*Fløguhúsin á Førist hjá Páll Finnur Páll.*

*Mynd: Heiðrik á Heygum.*

**Páll Finnur Páll eru til reiðari við einari nýggjari útgávu. Og teir halda fram, har teir sleptu seinast**

ÚTGÁVA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Teir hava sungið um tann forelskaða sjónleikaran og um leysliga klæddar menn í Plantasjuni.

Nú standa heimleys á Herberginum og óreinir abbar á skránni.

– Jaja, vit borðreiða við nøkrum sera eymum evnum um hesaferð, eitt nú heimloysi, blóðskemd, ótti og harðskapur, sigur Finnur Jensen, annar forsangari í bólkinum Páll Finnur Páll.

Teir í bólkinum tykjast við nýggju útgávuni Førist vera vorðnir enn fúlari. Tað tykist ikki vera nakað evni, sum ungu menninir ikki hava hug at siga sína hjartans meining um.

## Skal fram

Ikki tí. Har eru nakrar kærleiksvísur og søtir tekstir á fløguni. Men tað er nú einaferð ikki beinleiðis kvøðuljómasangir, ið fáa teg at upp úr stólinum við fyrstu gjøgnumgongd.

– Tað skuldi ikki undra meg, um vit fara at skaka nøkur fólk. Tað er eisini meiningin, sigur forsangarin.

*Er tað rætt at gera gjøldur burturúr teimum heimleysu? Er tað somuleiðis ikki at fara um mark at syngja um tílíkan ótespiligan atburð, eitt nú í sanginum við tí pedofila abbanum?*

– Vit gera ikki gjøldur burturúr nøkrum. Vit lýsa nakrar trupulleikar í hesum samfelagnum, ið fá tora at siga nakað um. Vit meta tann besta háttin at viðgera evnini vera við einum beinraknum og speiskum tóna, har vit smyrja ríkiligt uppá, sigur Finnur Jensen.

– Hóast føroyska samfelagið skal eitast at vera eitt væl útbygt vælferðarsamfelag, so búgva framvegis heimleys fólk í Føroyum, og insest verður at kalla ikki tikið upp á tungu, sigur Finnur Jensen, ið saman við Páll Odduri Rubeksen hevur skrivað tekstirnar á fløguni.

## Drúgva framleiðslu

– Hetta er stórt. Vit hava bíðað leingi eftir hesi løtu. Satt at siga ivaðust vit, um løtan nakrantíð fór at koma, sigur ein fegin Finnur Jensen, við greiðari tilsipan til, at fløgan hevur verið óalmindiliga leingi ávegis - bæði í studio og í framleiðslu høpi.

Upptøkurnar byrjaðu á sumri í fjør og vóru lidnar á páskum í ár. Men av ymsum orsøkum er fløgan ikki komin út fyrr enn nú.

Munurin á hesari útgávuni í mun til ta fyrru, siga teir í bólkinum vera, at Førist er meira rokkkend og hevur meira beinraknar tekstir.

Á fløguni eru tíggju løg umframt eitt goymt eykalag. Páll Finnur Páll er einamest kendir fyri lagið Forelskaður Sjónleikari, men eru eisini vorðnir væl umtóktir fyri teirra framførslur, serligu tekstir og fangandi løg.

Fleiri av nýggju løgunum vóru roynd á G! festivalinum fyri kortum, og tá tóku fólk øgiliga væl ímóti nýggju løgunum hjá bólkinum.

## Ættartalva til seyðahundar

Seyðahundafelagið hevur nú fingið vissu um, at føroyskir hundar nú kunnu fáa sonevnda ISDS skráseting. Vanliga er bert møguleiki at fáa slíka skráseting, um bæði foreldrini at einum hundi eru skrásett í somu skipan, og tí ber sjálvandi ikki til uttan víðari at fáa teir føroysku hundarnar skrásettar.

Men fyri stuttum varð Føroya Seyðahundafelag góðtikið sum limur í ISDS, og tí verður fyrstu stuttuna gjørt undantak, soleiðis at ein byrjandi ISDS skráseting kann fara fram.

Tað verður so sjálvur formaðurin í ISDS, Jim Easton, sum kemur til Føroya, og verður tað hann, sum ger av, hvørt ein hundur er egnaður til ISDS-skráseting.

Vitjanin verður tann 29. august, og sagt verður, at tey, ið ynskja at fáa sínar hundar skrásettar, men sum enn ikki hava latið neyðugu upplýsingarnar, verða biðin um at gera alt fyri. Hetta verður gjørt við at seta seg í samband við formanninum í felagnum, Eyðstein Jensen.

**-jm**

## Føroyskur formansskapur

Henrik Old er nú nýggjur formaður í Útnorðurráðnum.

Henrik tekur við formanssessinum eftir íslendska Birgir Ármannsson.

Tá Henrik Old tók við sessinum á fundi, sum Útnorðurráðið júst hevur havt, staðfesti hann, at bæði millum- og altjóða samstarv fáa alt størri týdning.

– Fyri okkum í útnorðuri inniber hetta bæði avbjóðingar og møguleikar, men tað er truplari hjá smæstu tjóðunum at verða hoyrdar, staðfesti Henrik, sum tó legði afturat, at júst útnorður-samstarvið betrar um hesi kor.

Henrik Old er føddur í Vági í 1947. Hann varð fyrstu ferð valdur á ting fyri javnaðarflokkin í 1984. Síðani 1995 hevur hann verið formaður í vinnunevndini á tingi.

Umframt Henrik Old telir formansskapurin í Útnorðurráðnum Jonathan Motzfeldt, formaður, og Birgir Armannsson, annar næstformaður.

**-jm**

## Janus og Janus

**Rætting.** Í grein í blaðnum í gjár umrøddu vit heiðurin, sum Listafelagiði hevði sýnt tveimum av stóru listamonnum okkara. Tíverri var navnið á øðrum teirra komið skeivt fyri. Í greinini stóð, at tað var Janus Mohr, sum saman við Ingálvi av Reyni hevði fingið heiðurin. Talan skuldi sjálvandi vera um Janus Kamban. Vit biðja lesararnar og teir báðar Janus um umbering fyri mistakið.

**-jm**

## Ein málverji við handskum og brandslangu

**Komandi leygardag skipar Sandavágs Ítróttarfelag fyri serstøkum summartiltaki. Eitt av forvitnisligu tiltøkunum henda dagin er brandslangufótbóltur**



*Tað gongur bæði hart – og vátt! – fyri seg, tá brandslangufótbóltur er á skránni. Nú verður skipað fyri slíkari kapping í Sandavági*

*Mynd: Sandavágs kommuna*

SUMMARSTEVNA

**Sandavágur:** Nógv spennandi tiltøk eru á skránni í Sandavági leygardagin, nú árliga summartiltakið hjá ítróttarfelagnum í bygdini er á skránni.

Umframt grillparty, laksatorg og víttfevnt undirhald, verður eisini ein serstøk fótbóltskapping á skránni.

Henda kappingin verður í stóran mun skipað sum ein vanlig fótbóltskapping, men rættiliga stór frávik eru kortini frá teimum reglum, sum altjóða fótbóltssambandið hevur sett upp, og sum vanliga verða brúktar, tá dystir verða leiktir á Valloyruni.

Í fyrsta lagi er ikki neyðugt at dysturin skal spælast á einum vanligum fótbóltsvølli, og í øðrum lagi er málverjin útgjørdur við einum serstøkum amboði, sum nokk skal halda sjálvt teir ídnastu áleypararnar burtur.

Sjálv stevnan byrjar kl. 11, og kl. 17 verður hesin serstaki dysturin á skránni, veit heimasíðan hjá Sandavágs kommunu at siga frá.

### Stuttligt og váttligt

Hetta er tó ikki fyrstu ferð, at sandavágsmenn eru við í slíkum vátum dystum.

Í summar var nevniliga eitt ferðalag, sum taldi 40 fólk úr Sandavági, á vitjan í vinarbýi teirra í Íslandi, Neskaupsstaði.

Á hesi vitjan sluppu menninir at luttaka í hesi serstøku kappingini í brandslangufótbólti. Og teir stóðu seg rættiliga væl, og komu heimaftur við heiðursmerkjum í silvuri. Nú skulu so sandavágsfólk og aðrir gestir á stevnuni verða vitni til, hvussu henda kappingin er.

Henda heldur sjáldsama kappingin gongur í øllum sínum einfaldni út uppá, at tvey lið hittast til fótbóltsdyst, hvar tað skal vera. Hetta kann ofta verða mitt á gøtuni, har áskoðararnir standa tættir fram við vøllinum.

Fimm mans eru á hvørjum liði, og reglurnar eru annars sum vanligar fótbóltsreglur, ella liðini kunnu avtala frávik eftir vild.

Tað serliga er kortini tað, at málmaðurin á hvørjum liði hevur eina brandslangu at hjálpa sær við. Hesin spular so alt, sum fyri er, tá bólturin kemur honum ov nær.

Tað standast ofta rættiliga stuttligar – og vátligar – støður av hesum. Eisini áskoðararnir fáa karm av og á.

**sb.**